## Atli við í sigri

Landsliðsspælarin Atli Danielsen spældi við allan dystin, tá ið FC Roskilde um vikuskiftið vann venjingardyst ímóti eykamonnunum hjá superliga felagnum FC Nordsjælland. Bert eitt mál kom í dystinum, og tað skoraði Roskilde nakað fyri hálvleikssteðgin. Atli Danielsen spældi á miðvøllinum, og hann hann fekk allar 90 minuttirnar í hesum dystinum, sum var tann 9. venjingardysturin hjá Roskilde í ár. Roskilde spælir í næstbestu donsku fótbóltsdeildini.



## Løkin vann

Bogi Løkin spældi við besta liðnum hjá Frem í síðsta venjingardystinum, áðrenn kappingin nú verður tikin uppaftur. Bogi byrjaði á miðvøllinum og var eisini við í uppspælinum til fyrsta málið í 3-2 sigrinum hjá Frem ímóti Hvidovre. Men tíðliga í dystinum fekk hann ein lítlan snudd og mátti lata seg skifta út stutt fyri steðgin.

### StÍF-H71 18-26 (9-9):

# H71 vann nervakríggið

**Nervar darvaðu spælinum í samfullar 45 minuttir á Skála í gjár. Men so slepti H71 bremsuni og rann StÍF um koll**




Uni Holm Johannesen

Tað loysti seg at sleppa bremsuni seinastu løtuna.

Tað er greiða niðurstøðan, nú H71, sum hevur verið í tungum sjógvi seinastu vikurnar, eru farnir undir seinastu royndina at sleppa í FM-finaluna. Hoyvíkingar vunnu í gjár við 26-18 á útivølli móti StÍF.

Men í samfullar 50 minuttir var tað ikki serliga áskoðaravinarligt. Liðini løgdu líka í, um áskoðararnir sótu við afturlatnum eygum. Leikferðin var lág og málini vóru fá. Sum heild var hondbóltsdysturin vánaligur.

Orsøkin er fyrst og fremst, at øll stig hava stóran týdning í løtuni. Tí valdu liðini at vera sera ansin í sínum spæli. Hóast bæði strandingar og hoyvíkingar vóru til dystin fús, vóru eingin tekin um tað í spælinum. Mongu nærdystirnir seinkaðu spælinum og einstaklingarnir vístu einki dirvi at brúka hugflogið. Óttin at tapa var av sonnum størri enn viljin at vinna.

Liðini fylgdust undan hvíldini. Gestirnir úr Hoyvík vóru omaná allatíðina, men seinastu løtuna vórðu teir meira frísinnaðir í sínum spæli og runnu heimaliðið um koll. Tað gav av sonnum úrslit. H71 vann 26-18.

StÍF og H71 eru trý stig frá finaluplássinum í løtuni. Fýra stig eru eftir at spæla um. Á pappírinum hava strandingar torførastu uppgávuna. Teir skulu tvær ferðir til høvuðsstaðin at spæla móti Neistanum og Kyndil. Komandi uppgávurnar hjá H71 eru Kyndil og KÍF á heimavølli. Bæði liðini hava tørv á fýra stigum, samstundis sum VÍF skal tapa báðar, um annaðhvørt StÍF ella H71 skal í finaluna.




Bárður Brimvík í H71 og Borgar Danielsen í StÍF stríðast um bóltin

Mynd: Álvur Haraldsen

### FAKTA

**StÍF-H71 18-26 (9-9)**
**10 min:** 2-3
**20 min:** 5-5
**40 min:** 13-15
**50 min:** 16-19
**Málskjúttar**
**StÍF:** Leivur Justinussen 4, Pauli G. Hansen 3, Christian Preda 3, Jóannes Prestá 2, Borgar Danielsen 2, Sune Ernotsson 2, Jógvan Berg 1, Marius Joensen 1
**H71:** Dánjal Torgarð 7, Janus Sørensen 6, Esbern Patursson 5, Karolis Dainys 3, Poul Kjartan Dam 3, Rógvi Sørensen 1, Rúni Højgaard 1
**Brotskøst:** H71 4
**Útvísingar:** StÍF 4, H71 3
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

### KÍF-Neistin 35-37 (16-22):

# Kollfirðingar sakna stig

**KÍF hevur nú tapt tríggjar ferðir upp í slag. Fyri trimum síðan vóru kollfirðingar á finalukós, men tann dreymurin er ikki serliga ítøkiligur longur**




Uni Holm Johannesen

Tað er fá fet millum viðgongd og mótgongd.

Tað mugu kollfirðingar í øllum førum sanna, nú teir aftur stríðast fyri at sleppa undan aftasta plássinum. Fyri trimum vikum síðan vóru kollfirðingar á finalukós. Men liðið hevur nú tapt tríggjar ferðir upp í slag, og seinasta tapið var í gjár, tá Neistin vitjaði í Kollafirði.



Neistin hevði takið á KÍF í gjár, tá kollfirðingar taptu triðja dystin upp í slag

Mynd: Álvur Haraldsen

Fyri steðgin høvdu gestirnir úr høvuðsstaðnum fult tamarhald á dystinum. Neistin rann avstað beinanvegin, tí kollfirðingarnir nærmast gav gestunum ókeypis atgongd at royna seg móti Óla Kristiani Djurhuus. Serliga høvdu Tróndur Kragesteen og Jugoslav Djumic lætt spæl.

Ingi Olsen, venjari hjá Neistanum, framdi fleiri broytingar í seinna hálvleiki. Hann fyrireikar í løtuni liðið til finaluna, og tí er neyðugt at allir sleppa framat at vísa sítt virði. Og við einari tryggari leiðslu sluppu Kristian Dulavík, Heini Ragnarsson og Jens Mohr millum annað á vøllin. Hesa løtuna stríddi heimaliðið seg aftur í dystin.

Tað eydnaðist teimum tó ikki at koma upp á javnleiki, hóast munurin einu løtuna bara var eitt mál. Neistin vann við 37-35.

Komandi vikuskiftið skal KÍF til Vestmanna, har kravið er tvey stig, um kollfirðingar skulu verða partur av FM-finaluni.

### FAKTA

**KÍF-Neistin 35-37 (16-22)**
**10 min:** 2-7
**20 min:** 11-15
**40 min:** 22-30
**50 min:** 29-34
**Málskjúttar**
**KÍF:** Rógvi Weyhe 8, Teitur Joensen 7, Andrias Nielsen 5 (1), Ási Dam 4, Niklas Reginsson 4, Tony Weyhe 3, Regin Petersen 2, Ingi Johannesen 1, Bergur Lutzen 1
**Neistin:** Jugoslav Djumic 7, Tróndur Kragesteen 7, David Edvardsen 7, Sjúrður Thomassen 5, Heini Hanusarson 5, Finnur Hansson 5, Kristian Dulavík 1
**Brotskøst:** KÍF 3, Neistin 1
**Útvísingar:** KÍF 4, Neistin 2
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánial Samuelsen